


# »Føroyskar Søgur 2 stendur einki aftanfyri Føroyskar Søgur 1«

**Uni Leitisstein Hansen, ið hevur lagt røðina av filmsfløgum við Føroyskum Søgum til rættis fyri Substanz og Eik, svarar her nøkrum spurningum um verkætlanina.**

**Hvussu vilt tú lýsa hesa filmsfløguna aftur ímóti teirri undanfarnu?**
– Føroyskar Søgur 2 stendur einki aftanfyri Føroyskar Søgur 1. Hon er eins fjøltáttað, og konseptið er tað sama – vit fáa søgur um smáar og stórar hendingar, ið hava myndað dagligdag føroyinga seinastu 100 árini. Vit sleppa at uppliva alt frá fótbólti í 1926, neytakonum í fimmtiárunum og til fyrstu royndirnar við rutuflúgving millum Føroyar og umheimin.

**Hevur tað verið øðrvísi at lagt Føroyskar Søgur 2 til rættis?**
– Ja, tí í hesum umfarinum havi eg gjørt allar søgurnar sjálvur, og eg má ásanna, at beint nú eri eg sera moyrur í heysinum av at jonglera við øllum handritunum, myndunum og faktaunum til Føroyskar Søgur 2. Eg má rósa mínum samstarvsfelagi Helga Toftegaard, ið hevur sett Føroyskar Søgur 2 sama, tí tað er ótrúligt, at tað hevur hepnast honum at fingið so frægt sett saman burtur úr mínum mongu luftigu hugskotum og ógreiðu handritum. Og so hevur Helgi eitt Jobs tol, ið hevur verið sera kærkomið í arbeiðinum við at gera Føroyskum Søgum 2.

**Hvat hevur havt størst týdning í arbeiðinum við Føroyskum Søgum?**
– Álit. Eg eri sera eyðmjúkur yvir tað álit, ið so nógv fólk hava víst mær, tá tey hava latið meg handfarið og valt burtur úr teirra privata filmstilfari. Eg eri eisini komin at kenna hópin av sera áhugaverdum fólkum, ið eg neyvan hevði komið í samband við annars og tað er ein stór eyka gáva at fáa. Tað hevur eisini verið sera áhugavert at sloppið at arbeitt her á søguliga Nordisk Film, har Substanz heldur til. Umhvørvið er aldargamalt og her er allatíðina nógv virksemi í gongd. Seinastu tíðina eru vit dotnir um geitir og annað, ið hoyrir til upptøkurnar av komandi donsku skemtirøðini "Cellen", sum er um ein bólk av yvirgangsmonnum.

**Fáa vit eisini Føroyskar Søgur 3?**
– Eg eri sera áhugaður at arbeiða víðari við tí rúgvusmikla filmstilfari, vit hava funnið fram í sambandi við Føroyskar Søgur. Tilfarið er sera umfatandi og tískil eru nógvir møguleikar í tí. Tað fyriliggur tó ikki nakað ítøkiligt beint nú, men vónandi býður okkurt seg. Eg fari komandi tíðina at kanna møguleikarnar fyri at fáa okkurt í lag. Uttan mun til, hvat framtíðin hevur at bjóða, hevur hetta verið tað strævnasta, men eisini tað stuttligasta og mest spennandi arbeiði, eg nakrantíð havi havt.





**1 "Gymnastikk", bóltspæl og tílíkt (11.06)**
Heilt frá siðbundna kappróðrinum umvegis fótbólt á mýrulendi til handbólt og glíming.
**2 Við biðum á baki (7.20)**
Neytakonurnar ganga í fimmtiárunum niðan í fjøllini við biðum á baki og stokkum í hendi at mjólka neytum.
**3 Teir taka land (12.30)**
Í mai 1939 verða 225 mans førdir til Grønlands at rógva út, og seta hol á eitt spennandi tíðarskeið í fiskivinnusøgu føroyinga.
**4 "Mesters hemmelighed" (4.49)**
Í ein mansaldur myndar Ansgar Jensen gamla Málingahandilin í Fuglafirði.
**5 Vagar Airport (8.34)**
Flogvøllurin í Vágum verður bygdur undir krígnum, og longu í 1946 verða fyrstu royndirnar við rutuflúgving gjørdar.
**6 Lívsins mjólk (5.33)**
Mjólkin hevur í øldir verið avgerandi fyri føðslu føroyinga, og mong høvdu kúgv í kjallaranum.
**7 Frá bygd til bý (14.07)**
Klaksvík gjøgnumgongur eina ógvusliga menning, eftir at J. F. Kjølbro letur upp sín fyrsta handil í 1915.
**8 Frá leypi til lastbil (4.27)**
Teir fyrstu vegirnir gera tað lættari at koma fram eftir landi, men teir elva eisini til rembingar.
**9 Føroyar vaksa saman (8.21)**
Tilveran broytist, tá oyggjarnar verða knýttar saman við vegum, brúgvum og tunlum.
**10 Ein nýggj byrjan (4.23)**
Sjósetingini av fyrsta stálskipið, ið er smíðað í Føroyum, Þorkeningur, byrjar í 1961 eitt nýtt tíðarskeið fyri føroysku fiskivinnuna.
**11 Tá leikur veðrur álvara (4.54)**
Royndu bjargamenninir fygla lomvigur í Skúvoy í 1949, meðan børnini eftirapa vandamikla veiðiháttinum á bakkanum.
**12 Allar snildir loyvdar (1.36)**
Í 1970 streyma 15.000 fólk til keypsstevnu í nýggju Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn at skoða nýggjastu vørurnar.
**13 Ein uppliving fyri lívið (5.43)**
Tá unga Sangkórið í Ebenezer í 1948 ferðast til Aberdeen, er tað fyrstu ferð, fleiri av ungu limunum í kórinum eru uttanlands.

## EYKAÁGÓÐAR

**Garðurin eitur "Víkagarður" (10.52)**
Filmurin lýsir gerandisdagin hjá kongsbóndanum Jákupi og hansara familju í 1946.
**Føroyar í dag (11.54)**
Brot úr løtumynd av føroyska samfelagnum við inngangin til sjeytiárini. Jákup A. Arge og Knud Goll settu saman.

## KUNNING

**Heiti:** Føroyskar Søgur - Upplivingar úr gerandisdegnum 2
**Stuðla:** Eik Grunnurin
**Framleitt:** Substanz
**Lagt til rættis:** Uni Leitisstein Hansen
**Sett saman:** Helgi Toftegaard
**Samlað spælitíð:** 116 min

*WWW.FOROYSKARSOGUR.FO*





